# Skemt



MYND: POLFOTO

## Lofta!

Sumo glímarin Kisenosato verður her tveittur av vøllinum av Tochinoshin, tá teir berjast í einari serligari heystarkapping í Tokyo. Spurningurin er bara, hvør skal lofta, og hvør í allari víðu verð skal fáa Kisenosat á føtur aftur.

- Stóri fyrimunurin við EM-endaspælinum í 2012 er, at tað verður í Póllandi og í Ukraina!
- Føroyskur fótbóltur er ikki í einum aldudali, men í einum mikladali
- Er Ísak ein meinbogi ella ein høgnaboði?
- Kann starvsnevndin Í FSF »forseta« uppá hendan mátan?
- Ein komandi aðalskrivari má billett-lúka allar treytir, sum Høgni setur honum.
- Verður Ísak stóru-stovureinur aftur?
- Málið um Ísak má fáa ein Líðar-enda!
- Aðalskrivarin sigur seg hava eina Uk-reina samvitsku
- Kalt er hjá Høgna á toppinum, er fjálgari í Mikladali?
- Aðalfundur ella aðalskrivarafundur?
- Årsagen til uenigheden i bestyrelsen er, at meningerne har et vidt felt
- Er meirilutin í starvsnevndini rúnabundin?



MYND: POLFOTO

## Vinstra **høgra**

Hvussu í allari víðu verð kunnu hesi 8000 fólkini halda skila á beinunum, sum skulu standa á rulluskoytum. Myndin er tikin í Berlin herfyri, og eg veit ikki, um vit hava nakað slóðbrótandi ráð. Kunnu vit bara fyrisláa vinstra-høgra, vinstra-høgra...



MYND: POLFOTO

## Blandaður tvímansleikur

Vit hava hoyrt um einmansleik, tvímansleik og blandaðan tvímansleik, men hvat hesin dysturin kann kallast, er ikki gott at vita. Eitur blandað vekt í tvímansleiki?

## Í RANGASTRÚPAN

**Altso, skulu vit taka land?**
Útlendingaøkið føroyskt um eitt ár
*KvF*

**Var tað stigatalvan?**
Tey trý fremstu kvinnuliðini í hondbólti spæla í dag móti liðum, sum eru í niðaru hálvu av steypakappingini.
*Sportal.fo*

**Nei, sjálvandi ikki**
Veðurlagsavtalan fer ikki at fevna um alt
*KvF*

**Hvussu skal tað verða friður?**
Trýss trygdarfólk í Irak handtikin fyri yvirgang
*Dimma*

**Nú stendur verðin ikki longur**
Kópa- og revaskinn í Fugl...
*Kvett yvirskrift á Olivant*

**Nýggjur vinnuvegur**
Fingu peningin aftaná umrøðu í Dimmalætting
*Dimma*

**Gjøgnumtrekkur**
Fiskivinnuskúlin letur hurðarnar upp
*Norðlýsið*

**Fáa vit minni Co2 útlát av tí?**
Annika og Kuupik vilja bæði vera við í veðurlagsavtaluni
*KvF*

Skemt

## UMAFTURAFTURUM
## HØGNI DJURHUUS



# Veingjadust

Í sjónleiki sínum »Aftan á undrið« hevur Jóanes Nielsen eisini eitt minni tema umframt tey bæði stóru, sum eru religión og deyðin.

Hetta evnið er vanvirðingin fyri listafólkum. Tove, mamma Dávid, er sjónleikari. Eingin uttan um hana virðir hana fyri tað, tvørturímóti. Hon er vird líka lítið sum ein hora. Ein ikki óvanlig samanbering í skaldskapi um ússaligu kor listafólka.

Men sjálvsvirðing hennara er sterk. Sjálvsvirðingin ber Tove gjøgnum eitt lortalív. Vit kunnu siga, at hon livir av sjálvsvirðingini. Uttan hana var hon ivaleyst livandi deyð. Tove er listafólk. Hon skammast ikki at koma inn á pallin, hóast hon væl veit, at hon er ikki tann skærasta stjørnan har.

Sum ein rættur høvundur dámar Jóanesi Nielsen hana. Hon hevur hansara empati. Høvundar eru góðir við sínar persónar, skaptir av eymleika.

Í Føroyum eru listafólk ikki tald við, tá samfelagsins stuðlar verða reksaðir upp, onnur enn tey, sum mála íløgur. Mála málningar við nógvari olju, sum spekulantar og onnur, sum hava pengar ella halda seg hava pengar, standa í bíðirøð uttan fyri ferniseringarnar fyri at fáa fatur í. Ikki tí teimum dámar abstrakta motivið ella listaverkið sum so, men tí tey gera ein íløgu. Nakað sum at keypa tey røttu partabrøvini.

Í leikinum hjá Jóanesi Nielsen verður tosað ljótt um listafólkini. Tey, sum sita á café og drekka øl og brúka kjaft um politikk allan dagin.

Og hvat so? Flestu stóru listafólkini, skaldini, leikstjórarnir, tónleikararnir og hini vóru ella eru alkoholikarar og /ella narkomanar. Eisini tey, sum fáa virðislønir, tá ringa samvitska samfelagsins skal sminkast.

Vanvirðing fyri listafólkum er tema, sum millum annað Ingmar Bergman brúkti nógv í sínum filmum.

Ingmar Bergman, sum gav einum ummælara nevan á kjaftin. Tað var, tá Bergman var stjóri á Dramaten í Stokkhólmi.

Sigandi eisini fyri støðuna í Føroyum er, at »Aftan á undrið« verður spældur á Tjóðpalli Føroya. Tjóðpallinum, sum var heimleysur, hevði hann ikki innivist frá Tórshavnar kommunu.

Men nú sigst, at tjóðleikhús skal byggjast. Nei, vit hava ikki fingið ein mentanarpolitikk. Hann fáa vit ongantíð. Tað er kreppupolitikkur. Handverkarar eru arbeiðsleysir, byggivinnan er í neyð, tað almenna noyðist at byggja.

Tove, mamma Dávid, er sjónleikari og hon pimpar. Hon hevur hjarta, og hon hevur sál. Maðurin rýmir til Logostrúboðaran, læknan og bíbliusmuglaran Floru. Hon er ein parodi, hjartaleys og sálarleys.

Tove er eingin eingil. Hon er ikki brennimerkt. Einglar eru keðiligir, kynsleysir og eldfimir.

Einglar, ja, tað var ein illmyrkan vetrardag, eg stóð við barrina á flogvøllinum í Tromsø. Barrvørðurin, ein kvinna við góðari barlast av lívsroyndum og fevnandi útstráling, er ein av hesum barrvørðunum av Bakkusar náði.

Fryntlig, prátar við øll, skemtiligar viðmerkingar fúka um barrdiskin alla tíðina. Allir tystir gestir fáa nøkur fløvandi og stimbrandi orð.

Nú kemur ein strongdur bissnissmaður blásandi inn í barrina. Hevur nakrar brævbjálvar í hondini og spyr, um nakar postkassi er. Nei, so noyðist hann út úr fráfaringarhøllini og skriva seg inn aftur.

»Tú lýgur!«

»Nei, men eg kann taka brøvini og lata tey í postkassan, tá eg fari til hús,« sigur hon innan fyri diskin.

»Tú ert ein eingil,« svarar klædningsmaðurin og gevur henni brøvini.

»Ja, en engel med støv på vingerne,« svarar hon í stundini.

Hjá okkum, sum ikki eru einglar og hvørki duga ella tora at flúgva, eru slíkir skeinkjarar meira verdir enn gull. Nógv meira verdir enn nakar trúboðari. Og líka nógv verdir sum listafólk, sum drekka, roykja og sniffa.